## Dragandi ungdómslív

**Ein lesur um alt frá turrum heitum hondum til vátar kossar og mjúkar mjadnar og rykkingar, sum fara ígjøgnum kroppin. Lýsingarnar eru inniligar, fangandi og viðhvørt humoristiskar. Rithøvundurin hevur rakt tónan sera væl í einum stykki, sum er lítið vant í føroyskum ungdómsskaldskapi áður.**

*Marjun Syderbø Kjelnæs: Skrivað í sandin*

Eitt vikuskifti í Havn í 2010 saman við ungfólki um 16 – 19 ára aldur. Tað er frá fyrstu síðu ein rundferð í eini spennandi villiniborg, sum hvørki hevur inn- ella útgongd, men óteljandi krókar og loynigongir við dýrgripum og opnum sárum hvørt um annað.

**Dagligt stríð**

Lesarin hittir gentur og dreingir, sum stríðast við seg sjálvan, vinir og familju. Minnilutakenslur, ótryggleiki og kapping millum vinir tykjast vera grundkor. Nøkur hava haraftrat álvarsamari trupulleikar at liva við, sum t.d. fiti, etingarólag og tað at vera samkyndur. Stríð við foreldrini er gerandiskostur. Hjá summum er tað dagligt argilsi inn á foreldrini, meðan tað hjá øðrum er komið til vanvirðing. Foreldrini berjast við sítt. Onkur er ótrúgvur, onkur annar livir saman “on and off” og uppaftur onnur dragast við sjúku.

**Vátir kossar**

Kærleiki og kynslív fylla nógv. Ein lesur um alt frá turrum heitum hondum til vátar kossar og mjúkar mjadnar og rykkingar, sum fara ígjøgnum kroppin. Lesarin er við, tá Erla verður bergtikin av Tróndi, tá Bjørt skal fara í song við einum drongi fyrstu ferð, og tá Tróndur lættir ringasta trýstið undir brúsuni. Lýsingarnar eru inniligar, fangandi og viðhvørt humoristiskar. Tær spretta burturúr tí, sum er bygt upp frammanundan og kennast tí natúrligar. Har eru hvørki fjarstøða ella moralprædika. Rithøvundurin hevur rakt tónan sera væl í einum stykki, sum er lítið vant í føroyskum ungdómsskaldskapi áður.

**Villiniborg**

Søgan verður søgd í tíggju kapitlum. Allir kapitlarnir verða sagdir frá ymiskum sjónarhornum. Soleiðis fáa persónarnir júst sína søgu sagda um sama vikuskifti og ofta um somu hendingar. Hesin bygnaður ger ymisku tilgongdirnar og fatanirnar av veruleikanum sera týðiligar. Skríggjandi sár eru orðini, sum Tróndur sigur við Áslu náttina til sunnudag. Úr hansara

sjónarhorni hevur setningurin ein positivan undirtóna, meðan Ásla hoyrir orðini sum beinleiðis niðrandi. Einsemi og misskiljingar gerast soleiðis djúpar gjáir, sum tað er illa gongt tvørturum. Hvør kapittul er liður í einari samanhangandi ketu, har liðirnir krøkja seg í hvønn annan. Liðirnir eru treytaðir av hvørjum øðrum eins og persónarnir í søguni. Men á sama hátt sum ketan hvørki hevur byrjan ella enda, hevur søgan tað heldur ikki. Rithøvundurin rakar soleiðis neyvt samtíðina. Óteljandi møguleikar, sannleikar og leiklutir geva pisuni antin flogið ella blæsa hana um koll fyri síðan kanska at reisa hana aftur.

Málið ber søguna sera væl og gevur lesaranum eina heildaruppliving av innihaldi og máli. Setningarnir eru stuttir, og beinleiðis talan liggur tætt at gerandismálinum.

**Á tremur**

Ein føroysk ungdómsbók, sum fer fram í dagsins Føroyum, kann ikki vera annað enn áhugaverd fyri føroyskan ungdóm. Tó gevur aktualiteturin ikki skaldsøguni virði í sjálvum sær. Og her kann ein fáa tað fatan, at tað hevur havt ovurhonds stóran týdning at fáa næstan alt við í søguna, sum eyðkennir ungdómslívið anno 2010; t.d. etingarólag, fiti, tað at vera samkyndur, sálarsjúka og krabbamein, ótrúgv og vónsvikin foreldur og sjúk systkin. Tað er als ikki neyðugt í einari skaldsøgu við so høgari góðsku.

**Góða ferð**

"Skrivað í sandin" skapar í framúr góðum samspæli millum form og innihald eina bæði spennandi, ræðandi og gevandi villiniborg, har vitjan avgjørt kann viðmælast. Hvat skrivað er í sandin, skal ikki avdúkast. Tað má hvør einstakur villa seg inn í.